úrslitið hevði verið øðrvísi um samanstoytur ikki hevði verið. Umróður hóvaði ikki øllum, og bleiv tí ynsktur bæði »niður og norður«.

Men tann 23. juli, akkurát ein mánað aftaná, staðfestir dómsnevndin avgerð høvuðsdómarans — ta avgerð, sum varð tikin í tráð við grein 17 í kappingarreglunum.

Á Vestanstevnu í Sandavági tann 8. juli 1979 kostaði samanstoyturin millum Vágbingin, Nólsoyingin og Suðuroyingin, Vágbinginum FM-heitið og eina plasering í Vestanstevnuróðrinum, tí Vágbingur, sum frammanundan lá nr. 1 í FM-kappingini, kom ongantíð á mál. Um Vágbingur bert hevði fingið 3 stig, hevði tað verið nokk til, at hann framvegis kundi verið í kappingini um FM-heitið.

Høvuðsdómarin á Vestanstevnu kendi óivað eitt sindur til grein 17, men tordi ikki, við vælsignilsi frá ÍSF (róðrardeildini), at døma umróður, tí hann visti, hussu tápuliga róðrardeildin bar seg at viðvíkjandi umróðrinum á Jóansøku.

Tá tað gekk upp fyri okkum, sum róðu við Vágbinginum, hvat veruliga stóð upp á spæl, nevniliga FM-heitið, hildu vit at einasta rætta var at senda kæru til róðrardeild ÍSF, og har greiða frá, hvussu óregluliga farið varð fram í róðrinum í Sandavági.

Men tað var sum at »sletta vatn á gás« at biðja róðrardeildina viðgera kæruna, tí samvitska teirra var jú so kolasvørt aftaná »komediuna« við 8-mannafarsróðrinum. Róðrardeildin sendir kæruna beinleiðis til dómsnevndina, har hon blívur liggjandi í meira enn tvær vikur, tí dómsnevndarlimirnir eru uttanlands í summarferiu.

Tann 23. juli kemur so úrskurður frá dómsnevndini, og hann ljóðar upp á, at í 8-mannafarsróðrinum á Jóansøku skal grein 17 verða fylgd, meðan sama grein ikki er galdandi fyri 10-mannafarsróðurin á Vestanstevnu. Um henda dóm kann ikki sigast annað enn, at hann er bæði sjálvmótsigandi og bláoygdur.

Høvuðsorsøkin til samanstoytin á Vestanstevnu var jú, sum vit eisini visa á í kæruni, onki uttan kleyvarskapur høvuðsdómaranna, við tað at teir góðtaka róðrarøkið, uttan at kanna eftir, um alt er í lagi.

Dómsnevndin staðfestir róðurin á Vestanstevnu við teirri grundgeving, at tað stendur í grein 8 stk. 3 í »Reglum fyri dómsnevndir innan ÍSF og viðgerð av kærum«, at dómsnevndin kann ikki broyta avgerð dómarans í góðkenning av umstøðunum.

Men tað løgnasta av øllum er, at grein 17 í kappingarreglunum ikki verður nevnd við einum einasta orði í úrskurði dómsnevndarinnar frá 10-mannafarsróðrinum á Vestanstevnu, meðan dómsnevndin tekur og staðfestur 8-mannafarsróðurin á Jóansøku út frá somu grein 17 um samanstoyt, sama dag, á sama fundi, somu tíð og á sama stað. — Maka til sjálvmótsøgn man neyvan fyrr vera sæð í Føroya ítróttarsøgu. — Alt tað lógloysi, sum vit annars eisini vistu á í kæruni, verður heldur ikki tikið upp á tunguna í úrskurðinum.

Tann ólógligi róðurin á Vestanstevnu í Sandavági tann 8. juli og úrskurðurin hjá dómsnevndini tann 23. juli, hava sostatt forkomið ólavsøkuróðrinum og møguliga FM-heitum hjá einum 10-mannafari, einum gentubáti, tveimum dreingjabátum og tveimum gomlum 6-mannaførum úr Vágs Kappróðrarfelag. Slíkt má í orðsins sanna týdningi verða kallað NIÐURBRÓTANDI og OYÐILEGGJANDI fyri førsokan ítrótt.

Tað, at luttaka í kappróðrinum í summar og kappast við sonnum ítróttaranda, hevur dámt okkum sera væl. Men tá ið órættur og svik skulu koma upp í leikin, kunnu vit, hvussu fegnir vit enn vilja, tíverri ikki vera við longur.

Vágur hin 24. juli 1979

Manningin á Vágbingi

LOYNIHELLIÐ

eftir *J. M. Neale*

Røddir í oyðimørkini

3. PARTUR

Framhald

Markus Tebonius, landshøvdingin í Egyptalandi, er ein hjartagóður maður, sum hevur ferðast víða. Hann ferðaðist einaferð við einum kamelfylgi saman við hundrað fráskilagóðum rómverskum hermonnum hinumegin Nilánna til býin Berenike. Hetta var ímóti kvøldi. Ferðalagið kom júst fram við einum mølheyggi, tá ið teir hoyrdu røddina. Tað ljóðaði sum onkur — heldur óskilliga — rópti á landshøvdingan. Hann steðgaði fylginum beinanvegin. — Biðið! Eg komi beinanvegin aftur! Eg má bara vita, hvør ið rópar á meg her í oyðimørkini, rópti hann og læði við! — Teir staðkendu menninir, sum vóru við í ferðalanum gjørdust álvarsamir. Far ikki hagar! søgdu teir við hann. Far endiliga ikki hagar! Og so søgdu teir honum frá trøllum og fjalla-andum í oyðimørkini. — Men Markus var ikki tann maður, at hann læt sær siga. Hann reið ein umveg runt um heyggin og ætlaði sær at koma framá aftur fylgið hinumegin. — Tá ið hann var komin runt heyggin, sá hann ongan! Hann risti við høvdinum og undraðist, at hann, sum rópti, kundi hvørva so brádliga. Tá hoyrdi hann aftur sama rópið hinumegin frá. Hann rann straks yvir hagar og leitaði væl allastaðni, men fann onki. So gavst hann at leita og reið yvir móti fylginum, men tá hoyrdi hann knappliga røddina aftan fyri seg. Hann vendi beinanvegin og fór aftur at leita. Men alt til einkis. Nú sá hann ræðslusligin, at dagslýsið var næstan svunnið burtur, sólin var sett. Hann rópti og kallaði, men ongin hoyrdi hann. Við neyð og deyð eydnaðist honum at finna kamelslóðina aftur, og ikki fyrr enn langt var liðið út á náttina fekk hann fylgi sítt aftur. Tá høvdu hermenninir leitað leingi eftir honum.«

Difilus tagdi. »Soleiðis kundi eisini gingist faðir tykkara,« segði hann seinni. »Markus Trebonius slapp væl. Men hvørt ár finna teir rovini av ferðamonnum, sum vilstir eru burtur av leiðini. — Hvør veit, hvussu nógvir av teimum eru vilstir, tí at teir eru farnir at leita eftir hasari røddini!«

Hvussu so Jóhannes og Filippus royndu at lurta — so hoyrdu teir ikki røddina aftur.

Difilus tagdi eisini. Teir fingu ikki meir burtur úr honum. Øllum, teir spurdu, svaraði hann burturvið. Tað var, sum helt hann seg longu hava sagt dreingjunum ov nógv.

Nú var mánin afturundirfarin. Dreingirnir, sum mest vóru vanir at sita á hestbaki, høvdu ilt í øllum liðum av tí støðugu rugganini hjá kamelunum. Men teir kundu ikki steðga á enn.

Endiliga! — Vinstrumegin gøtuna sást ein trølsligur skuggi. Tá ið fylgið nærkaðist honum, sóu tey eini stór, fýrkantaði, høg hús.

»So eru vit framkomin, harri!« rópti trælurin.

Flóttafólkini riðu yvir til ein høgan garð. Difilus, sum tyktist vera kunnigur her, snaraði straks kameli sínum til høgru og fann eitt lið á garðinum har, so tey sluppu inn í sjálvi húsini. — Tey máttu vekja Cyrillu, hóast hon — í svøvni — stóð fast uppá tað, at hon var klárvakin! — Tá ið kríatúrini vóru farin aftur á føtur, vórðu tey eitt og eitt leidd gjøgnum liðið inn í túnið framman fyri húsini.

Ríðingin hevði verið long, so nú var gott at fáa fast undir føti aftur.

»Lat okkum nú fyrst vita, um tað yvirhøvur ber til at vera í hesum húsunum,« segði Basilius.

Difilus festi í ein av teimum kyndlunum, tey høvdu havt við. Nøkur ússalig rúm vóru í húsunum. Eisini túnið lá alt í órøkt.

»Vinstrumegin, har yviri, man vera ein trappa, tí í erva er eitt rúm, sum er nøkunlunda í standi!« rópti Difilus.

Móðurin bað geva sær ein kyndil afturat.

»Ansið eftir tykkum, her kunna vera eiturormar!«

»Jóhannes, Filippus og Difilus kunna fáa viðførið av kamelunum og ambæta teimum. Mamma, Cyrilla og eg gera til at leggja okkum her inni. — Soleiðis er skjótast at gera!« segði Basilius.

Móðurin fann skjótt á trappurnar. Tey kannaðu gjølla eftir, at ongir eiturormar vóru. Ímeðan fór Basilius oman trappurnar við einum kyndli. Hann trilvaði seg fram fet fyri fet. Trappurnar vóru sera vánaligar, so hann mátti vera varin, at hann ikki datt.

Hann slapp oman. Ein long, smøl gongd gekk beint tvørtur undir øllum húsunum. Hon var í hampiligum standi. Vinstru megin gongina lógu tvey hálv-rúm, sum ikki vóru so illa farin sum alt hitt í húsunum. Basilius lýsti í hvønn krók. — Hetta var eitt frálíkt hvíldarstað.

»Komið tit bara niður higar! — Men verið varin! Trappurnar eru so vánaligar! — Takið rekkjuváðirnar við tykkum!« Løtu seinni vóru øll til reiðar at leggja seg. Móðirin og Cyrilla lógu í tí handasta rúminum. Jóhannes og Filippus saman við faðirinum í tí fremra. Difilus hevði ballað eina rekkjuváð um seg og hevði sett seg úti hjá kamelunum. Hann tók ta fyrstu vaktina. Tveir tímar seinni skuldi Basilius loysa hann av.

Jóhannes var ikki meir enn sovnaður, nú kennir hann, at okkurt nemur varisliga við andlit hansara. Hann var klárvakin alt í einum. Hann hoyrdi eitt hvæsa spakuliga — og leit seg íkring. Tvey smá grøn eygu skygdu tætt við andlitið á honum.

Jóhannes hvakk við og leyp upp.

»Filippus! Pápi!« Alt sum hann um kvøldið hevði hoyrt um undarligar røddir í oyðimørkini mól í høvdinum á honum. Hvat mundi hatta vera...?

»Pápi! — Filippus!«

»Hvat bagir tær, drongur?«

Faðirin stóð longu undir liðini á honum — men sjónin, hann hevði sæð, var burtur.

»Hvat mundi hatta vera?«

»Eitt — dýr — eitt spøkilsi!« stamaði drongurin.

»Sovorðið tvætt!« segði faðir hansara.

»Jú, tað var tað! Okkurt nart við andlitið á mær. So froysti tað, og tvey stingandi grøn eygu stardu at mær.«

»Tú manst hava droymt, góði!«

»Nei, pápi, tað er púra vist! — Tað man hava sloppið sær út gjøgnum hasa gongina har.«

Difilus hevði hoyrt rópini og kom rennandi. Tá ið hann fekk at vita, hvat ið var, helt hann, at beinast var at kanna eftir, hvat tað mundi vera. Varisliga trilvaði hann seg oman gjøgnum gongina. Hon gjørdist alsamt smalari.

»Hatta hjálpir onki. — So leingi sum vit ikki vita, hvat ið tað var, er tað vandamikið at leita í myrkrinum.« — Hann hugsaði seg um eina løtu, so helt hann fyri: »Tað beinasta man vera, at vit laða upp fyri gongina.«

Men tað var ikki bara sum at siga tað. Tí gongin var nokk so víð, og tey høvdu ikki tilfar til tað.

»Tað var uppaftur betri at byrgja fyri hurðina inn higar«, helt Basilius.

Tað var skjótt gjørt. Hóast hvøkkin so sovnaður øll skjótt aftur. Ferðin hevði verið møðsom.

(Framhald)

Kunngerð um ferðslu á ólavsøku

Ólavsøkuaftan og Ólavsøkudag í tíðini frá kl. 14.00 til næsta morgun kl. 08.00 verður ikki loyvt at koyra eftir ella parkera akfør á Niels Finsensgøtu frá Vaglinum til AUTO.

Í somu tíð verður ikki loyvt at parkera akfør í Kongagøtu og Bryggjubakka.

Í hesum tíðarbili er tað bert loyvt at koyra tvørturum Niels Finsensgøtu við vegamótið Bøkjarabrekka/Niels Winthers gøta og eftir Kongagøtu báðar vegir, meðan Mylnugøta og Sverrisgøta millum Tórsgøtu og Tinghúsvegin verða stongdar fyri allari ferðslu.

Ólavsøkuaftan meðan kappróður fer fram í tíðarbilinum kl. 15.00 til kl. 18.00 verður eystara bryggja frá Kongabrúnni til J. Broncksgøtu stongd fyri allari ferðslu.

FØROYA LANDFÚTI,
hin 24. juli 1979
M. Nepper-Christensen

Jørð á Skálatoftum
Tríggir gyllin til sølu, um nóg høgt boð fæst.
Telefon 55460

Heldur tú ikki
sosialin